# Nýggjur studentaskúli í Suðuroy liðugur um trý ár

**Nú er klárt at fara undir nýggja miðnámsskúlan í Suðuroy og hann verður liðugur á várið í 2006**



*Um trý ár stendur flunkandi nýggjur miðnámsskúli fyri 50 milliónir klár at taka í nýtslu í Vági. Í skúlanum verður eisini meginbókasavn fyri alla Suðuroy og samkomuhøll*

SKÚLABYGGING
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Nú skal nýggjur miðnámsskúli byggjast í Suðuroy.

Tað hevur Løgtingið endaliga samtykt.

Løgtingið hevur samtykt at geva landsstýrismanninum í mentamálum, Høgna Hoydal, heimild til at fara undir byggingina.

Skúlin skal byggjast í avbera natúruvøkrum plássi vesturi á Vatninum í Vági og hann skal kosta í mesta lagi 50,4 milliónmir. Men av teimum skulu nakrar kommunur í Suðuroynni betala 5,4 milliónir, sum tær hava játtað at betala til eitt meginbókasavn, sum eisini skal vera í skúlanum. Miðnámsskúlin í Suðuroy hevur havt eina umskiftiliga tilveru. Upprunaliga helt hann til í hølum bæði í Vági og á Tvøroyri. Síðani varð hann fluttur til Vágs burturav, men hann hevur altíð húsast í fleiri húsum og tað hevur alla tíðina verið størsta ynski at funnið eina varandi loysn.

Nú er tann varandi loysnin funnin og á várið 2006, verður flutt í flunkandi nýggjan skúla vesturi á vatninum.

Við at byggja vesturi á Vatninum kann skúlin gagnnýta fótbóltsvøllin og ítróttarhøllina hjá VB, ið eru beint við.

Skúlin verður bygdur eftir tekningum hjá arkitektavirkinum hjá Árna Winther, ið vann arkitektakappingina um skúlan.

**Virkin partur í samfelagnum**

Tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at skúlin skuldi verða ein virkin partur í samfelagnum og geva møguleikar fyri at binda saman undirvísing, mentan, arbeiðslív og vinnulív í oynni.

Í skúlanum verða sostatt samkomuhøll. Samstundi gjørdi Vágs Býráð greitt, at greitt, at hon hevði áhuga í at hava býarbókasavn á skúlanum.

Úrslitið av tí er, at eitt meginbókasavn verður í skúlanum, har ið kommunurnar í Suðuroy skuldi betala ein part av útreiðslunum.

Í tí sambandi hava Porkeris kommuna, Hovs kommuna, Famjins kommuna og Vágs kommuna boðað frá, at tær eru sinnaðar at vera við í fíggingini. Hinvegin hava Hvalbiar kommuna, Sumbiar kommuna og Tvøroyrar kommuna boðað frá, at tær ikki taka undir við ætlanini.

Meginbókasavnið verður kortini veruleiki og tær kommunur, sum taka undir við ætlanini, betala so partin hjá kommununum.

**Byrjað í summar**

Ætlanin er at byrjað upp á skúlan í summar, tá ið jørðarbeiðið verður boðið út og so kann sjálvt arbeiðið byrja í august.

Sjálvt byggiarbeiðið verður boðið út komandi vár.

Ætlanin er, at øll byggingin skal taka trý ár og at skúlin skal verða klárur at taka í nýtslu á vári í 2006.

Skúlin verður bygdur til umleið 150 næmingar og gólvvíddin verður einar 2800 fermetrar. Av teimum verður sjálvt meginbókasavnið 700 fermetrar.

Tá ið útreiðslurnar, sum kommunurnar skulu betala av bókasavninum, verða lagdar afturat, verður kostnaðurin fyri alla byggingina beint omanfyri 50 milliónir.

# Ongar kanningar gjørdir enn

*Enn er onki kannað fyri at vita, um nýggi Smyril kann brúka Gomlu Rætt*



**Enn er Landsverkfrøðingurin ongan veg komin at kanna um nýggi Smyril kann leggja at á Gomlu Rætt heldur enn í Havn**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Enn er Landsverkfrøðingurin ongan veg komin at kanna um tað fer at bera til hjá nýggja Smyrli at leggja at á Gomlu Rætt, ístaðin fyri at sigla til Havnar.

Tað var herfyri, at landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm, bað Landsverkfrøðingin kanna møguleikarnar hjá Smyrli á Gomlu Rætt.

Kannast skal, um nýggi Smyril kann brúka havnina á Gomlu Rætt og um, hvørjar broytingar skulu til, fyri at hann kann brúka havnina.

Tað hevur hann gjørt í kjalarvørrinum á umrøðuni av umstøðunum í Tórshavnar Havn, ið summi siga er ógvuliga trong til tey bæði skipini, Norrønu og nýggja Smyril.

Oyvindur Brimnes sigur, at enn veit hann ikki, nær kanningarnar verða.

Hann sigur, at ætlanin hevur verið at gera siglikanningar í simulatori í Danmark, men tað eydnaðist ikki at sleppa framat í fyrstu syftu.

Men Landsverkfrøðingurin heldur, at tað eisini verður neyðugt at gera modelroyndir.

Sostatt skal málið takast upp fyri at vita, hvat skal gerast.

Landsverkfrøðingurin sigur, at hann hevur ikki fígging til eisini at gera modelroyndir. Sostatt má hann tryggja sær fígging, tí hann sigur, at tað helst verður neyðugt at gera modelroyndirnar eisini.

# Gera so skjótt av sum gjørligt

**Landsverkfrøðinguri n fer so skjótt sum gjørligt undir kanningarnar at vita, um tað ber til at gera tunnilin ímillum Øravík og Hov niðri í dalinum**



*Her sæst, teir báðir møguleikarnir, sum eru nevndir at gera tunnil ímillum Øravík og Hov. Upprunaliga varð ætlanin at gera tann ovara tunnilin. Semja er kortini um, at niðari tunnilin er nógv tann betri og nú skal kannast, um tað letur seg gera at bora hann har*

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Landsverkfrøðingurin fer nú beinanvegin at seta kanningasr í verk fyri at vita, hvussu møguleikarnir eru fyri at gera tunnil ímillum Øravík og Hov longur niðri í dalinum, enn upprunaliga ætlað.

Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp at gera Hovstunnilin nakað uppi í hæddini. Men síðani er komið fram, at norska felagið NCC heldur seg kunna gera tunnilin longri niðri í dalinum fyri einar 30 milliónir minni enn hon tunnilin kostar longri uppi.

Øll eru samd um, at fyri ferðsluna er hesin tunnilin niðri i dalinum tann besti.

Men ivi hevur verið sáddur um, antin undirlendið er egnað at bora tunnil ígjøgnum.

Hetta skal nú kannnast út í æsir.

Landsverkfrøðingurin sigur, at hann fer so skjótt sum gjørligt at seta kanningar í verk.

Oyvindur Brimnes sigur at teir eu í ferð við at fyrireika kanningarnar og at kanningarnar verða nú í vár og í summar.

Skuldi landsverkfrøðingurin sjálvur gjørt arbeiðið, hevði tað tikið ímillum tríggjar og fýra mánaðir.

Men Oyvindur Brimnes sigur, at teir fara at royna at fáa útgerð uttanlands fyri at arbeiðið kann ganga skjótari.

Men akkurát, hvussu langa tíð, tað fer at taka, veit hann ikki.

– Vit fara at bera so skjótt at sum gjørligt, so at so nógv grót sum gjørligt úr tunlinum kann brúkasttreytað av, at løgtingið játtar pening til tunnilin.

Men stóri spurningurin er so, um tað yvirhøvur ber til at gera tunnilin niðri í dalinum, men tað er so tað, sum kanningarnar skulu vísa.

Kanningarnar, sum skulu gerast, eru eitt nú kjarnuboringar.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hermann Oskarsson 50 ár



Í dag, 7. mai, fyllir Hermann Oskarsson í Havn 50 ár. Hermann er sonur Onnu og Oskar Hermansen í Havn. Sum ungur var hann arbeiðsmaður og var onkan túr til skips. Hann er virkin innan vinstravongin í føroyskum politikki og gekk á odda í orðaskiftinum um t.d. Nato og ES. Frá 1989-94 læs hann búskaparfrøði við lærda háskúlan í Keypmannahavn. Eftir at hava fingið prógv sum búskapar-frøðingur í 1994, var hann lærari á Kambsdali í eitt ár. 1. november 1995 var hann settur í starv sum fulltrúi á Hagstovu Føroya, har hann hevur verið stjóri seinastu fýra árini.

Hann var skrivari í búskaparráðnum frá 1. januar 1997 til 31. desember 1999. Síðan 1. januar 2002 hevur hann verið formaður í búskaparráðnum. Seinnu árini hevur hann ofta tikið lut í orðaskiftinum um búskaparlig og samfelagslig viðurskiftir sum heild, bæði í skrift og í talu. Hann hevur birt lív í mangt kjakið, ofta um evnir sum annars verða tagd burtur. Hann dugir sera væl at leggja síni sjónarmið fram. Hermann er giftur við Onnu Mariu, f. Nielsen, úr Havn. Børnini hjá teimum eru: Bárður, Marin og Turið. Hann er burturstaddur føðingardagin.

## Jona Michaelsen í Funningsfirði 50 ár



Í dag, 7. mai, fyllir Jona Michaelsen í Funningsfirði 50 ár. Jona er ættað úr Klaksvík og uppvaksin í Elduvík. Hon arbeiddi í mong ár í køkinum á Eysturoyar Ellis- & Røktarheimi í Runavík. Jona var ein av fyrstu føroysku kvinnunum, sum fekk starv í oljuvinnuni. Fyri tveimum árum síðan fekk hon, ígjøgnum Eurest Føroyar, starv sum hjálparfólk á boriplattforminum Sovereign Explorer í sambandi við oljuleiting við Føroyar. Síðan hevur hon arbeitt á hotelboriplattformum í Norðsjónum. Hon trívist væl í hesum starvi, og starvsfelagarnir siga, at hon er sera arbeiðssom og góð at samstarva við. Jonu dámar væl at ganga í náttúruni og er hon virkin í gongufelagnum í Eysturoynni. Hon hevur verið limur í fimleikafelagnum Støkk í yvir 30 ár. Í dag er hon nevndarlimur og kassameistari í Støkk. Jona eigur tveir synir og eina dóttur. Í sambandi við føðingardagin verður opið hús heima hjá Jonu í Funningsfirði komandi leygarkvøld.

## Fríðfinnur Johnsson fyrstilærari í Leirvík



Frá 1. august 2003 er Fríðfinnur Johnsson settur sum fyrstilærari í Leirvíkar Skúla. Fríðfinnur er 48 ára gamal, sonur Oliviu, f. Hansen, og John Joensen, bæði úr Leirvík. Hann er giftur við Juliannu Næs úr Havn. Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1981. Hann hevur verið lærari í Fuglafirði og á Oyrabakka. Frá 1984-87 var hann lærari á Føroya Fólkaháskúla og limur í stjórnini í Føroya Fólkaháskúla. Frá 1. august 2002 hevur hann verið á Føroya Handilsskúla. Hann hevur verið virkin í politikki og okkurt tíðarskeið verið formaður í Eysturoyar Tjóðveldisfelag.

## Dagurin

**7. mai. Flavia,** deyð í umleið ár 95. Henda abbadóttir keisaran Vespasianus gjørdist kristin og varð rikin í útlegd.

## Elsa Birgitta Petersen fyrstilærari í Hvalba



Frá 1. august 2003 er Elsa Birgitta P. Petersen sett sum fyrstilærari í Hvalbiar Skúla. Elsa Birgitta er 54 ára gomul, dóttir Elinborg, f. Samulesen, úr Havn og Poul E. Petersen úr Sørvági. Foreldrini vóru bæði lærarar og búðu í Havn. Hon tók læraraprógv í 1971 á Th. Langs Seminarium í Silkeborg. Hon var lærari í Danmark frá 1971-75 og í Runavíkar Skúla frá 1975 og settur deildarleiðari frá 1998-99. Umframt eftirútbúgvingarskeið, serliga í donskum, kristni og heimkunnleika til framhaldsdeildina, hevur hon eisini verið á ársskeiði í 1992-93. Elsa Birgitta var nevndarlimur í Føroya Lærarafelag frá 1980-84 og 1994-97 og formaður frá 1999-2003. Hon var nevndarlimur í Bókamiðsøluni frá 1982-85, nevndarlimur í bókmentanevnd Bókadeild Føroya Lærarafelags síðan 1996 og limur í skúlanevndini í Runavík frá 1992-96. Hon hevur skrivað skúlabøkurnar Vit arbeiða við Nýggja Testamenti 1 og 2.

Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni,
á arbeiðsplássinum, í grannalagnum
ella hvar tað skal vera, ið hevur ein
merkisdag sum t.d. rundan
føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag
ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv
ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:............................................................................................................
Bústaður:......................................................................................................
Bygd/býur:.........................................................Tel:..................................
Evt. arbeiðspláss:..........................................................................................

Merkisdagurin er: ..........................................................................................

Innsendari: ...............................................................Tel:............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo